## EG MEINI TAÐ

### Hvar er tað stóra politiska perspektivið?



*Durita Holm skrivar:*

Yvirgangsgerðirnar á USA tann 11. september og bumburnar, sum USA nú letur regna yvir Afganistan, setur nógv gerandisdags viðurskiftir í eitt nýtt perspektiv. Tað setur eisini tann hvønndagsliga politikkin í eitt størri perspektiv. Man verður varugur við, at heimurin uttanum okkum ikki bara hevur sekunderan týdning, men er nakað vit hava skyldu at brýggja okkum um. Í hesum globaliseringstíðum átti hetta kortini at verið eyðvitað eisini undur minni hóttandi umstøðum.

Í Føroyum hyggja vit alt ov nógv og gjølla at okkara egna nalva. Kanska ein av orsøkunum til, at politiska kjakið í Føroyum alt ov ofta er á so lágum og einkissigandi støði er, at vit alt ov sjálvdan lyfta høvdinum og síggja okkum sjálvi í einum heimsperspektivi, sum ein finna í heimspolitikkinum, har fortreytirnar eisini fyri okkara lítla samfelag verða lagdar. Hví er føroyskur politikkur so nalvafestur? Hvussu kunnu vit fáa størri perspektiv á hann og harvið lyfta hann upp á eitt hægri, minni persónbrikslandi støði.

Eg haldi meg ikki hava nakað fullgott svar, men eg vil tá meta, at tað at vit ikki kunnu føra uttanríkispolitikk er óheppið, og hevur avleiðingar sum røkka inn í tað heimliga politiska kjakið. Vit verða ov sjálvdan konfronterað við størri mál har teir etisku spurningarnir kunnu snúgva seg um lív og deyða. Ei heldur nýtast vit at umhugsa tey stevnumið sum umheimurin, t.d. í ST- ella øðrum altjóða felagsskaps høpi, noyðast at taka støðu til. Stevnumið har tey einstøku londini mugu hugsa um, hvussu tey ynskja, at hesin globaliseraði heimurin skal síggja út.

Tað er meir umráðandi nú enn nakrantíð áður at grunda um og luttaka í skapanini av heimsskipanini, hvør einstøk tjóð kann nú í nógv minni mun enn nakrantíð áður frábiðja sær at verða ávirkað av umheiminum. Øll eru ein integreraður partur av heimsskipanini í dag um vit vilja tað ella ikki, og tað er í stóran mun har fortreytirnar verða lagdar fyri tí mesta sum vit, sjálvt í heimligum politikki, mugu hava eina støðu til. Eg skal ikki her koma við nakrari meining um, hvat eg haldi um hesa nýliberalistisku globaliseringina, har einki burturgoymt horn av heiminum sleppur undan, men bert halda fast við, at hetta er nakað vit mugu fyrihalda okkum til og hugsa um. Og júst har liggur okkara trupulleiki, tí hví skal føroyskur politikkur taka støðu til slíkt? Okkara rødd verður jú ikki hoyrd í nøkrum altjóða høpi. Vit eru bara eitt hjáland uttan rættindi til at verða hoyrd ella til at ávirkað. Tað kríggið ímóti terrorismu, sum boðað er frá, og sum flestu tjóðir í heiminum taka undur við, er ein veruleiki. Tað, sum hendur í Afganistan í dag er eisini ein veruleiki, men í teimum flestu londunum verður í hesum døgum nógv kjakast um, um tann amerikansk/bretski hátturin at føra hetta stríðið ímóti terrorismu, er tann besti. Slíkt kjak verður ført frá fleiri atlitum, heimsspekingum, samfelagsfrøðingum, politikkarum og fólki annars við áhuga og kunnleika. Tað slepst ikki undan, at eitt slíkt kjak eisini setur dám á tað heimliga kjakið. Eg hugsi tað lyftir tað upp á eitt meir virðiligt støði. Tað vil tykjast óvirðilig at koma við tí vanliga smáliga brikslinum, samstundis sum kjakast verður um stórar etiskar spurningar viðvíkjandi altjóða støðutakan. Eg hugsi ikki tað er tilvildarligt, at spurningurin um fullveldi er so stórt júst í hesum tíðum. Um man er eitt tilvitað fólk, við áhuga fyri at ávirka tær fortreytir, ið eisini vit verða noydd at virka undir, so hevur tað størri týdning enn nakrantíð, at vera við í altjóða politikki. Spurningurin um fullveldi verður meira og meira relevantur hvønn dag. Okkum tørvar so sárt størri frásjón.

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

# 75 ár síðani Gággan spældi fyrstu ferð



Gággan 50 ár í heyst:

**Hevur nógv trúlovilsi og giftarmál upp á samvitskuna**

Tað elsta dansiorkestrið í Føroyum, Gággan, verður fimti ár í heyst. Øll hesi árini hevur verið spælt at kalla uttan íhald, men við skiftandi manning. Nú verður tað helst ikki leingi afturat. Sjónleikarhúsið í Havn hevur avgjørt at útihýsa øllum dansi vegna umbygging, og tað ljóðar, at Gággan fer at halda uppat, tá umbyggingin er byrjað.

Jazzband Triumph

*Fyrstu ferð, Gággan spældi, var tá Denna og Kjartan Mohr giftust 26. otkober í 1926. »Gággan« er best kenda navnið á dansibólkinum, men upprunaliga navnið var »Jazzband Triumph«, síðani »Jazzband Primus«. Í 1942 fekk orkestrið navnið Gággan eftir uppskoti frá Stig Rasmussen*

**Í november 1976 spældi Gággan fyri seinastu ferð til dans í Sjónleikarhúsinum í Havn. Tá hevði orkestrið eisini hálva øld á baki**

*Eirikur Lindenskov*

Í gjár vórðu liðin 75 ár síðani, at hjúnini Denna og Kjartan Mohr giftust – og hildu brúdleyp í Klubbanum í Havn. Hetta brúdleypið var slóðbrótandi, tá hugsað verður um dansiviðurskiftini í Havnini mestan partin av øldini, tí tá spældi kenda orkestrið, Gággan, fyri fyrstu ferð til dans – og helt á fram til 1976.

Í sambandi við at orkestrið hevði ætlanir um at leggja árarnar inn, tosaði Johnsigurd Johannesen, blaðmaður á Sosialinum, við Andreas Restorff í september 1976. Andreas spældi við Gágguni í 29 ár. Vit geva Johnsigurd orðið:

»Tað elsta dansiorkestrið í Føroyum, Gággan, verður fimmti ár í heyst. Øll hesi árini hevur verið spælt at kalla uttan íhald, men við skiftandi manning. Nú verður tað helst ikki leingi afturat. Sjónleikarhúsið í Havn hevur avgjørt at útihýsa øllum dansi vegna umbygging, og tað ljóðar, at Gággan fer at halda uppat, tá umbyggingin er byrjað.

Ein teirra, sum spældi í Gágguni frá fyrsta degi og í 29 ár, er Andreas Restorff.

– Tað mundi vera av tilvild, at vit fóru at spæla saman, sigur hann. – Vit vóru fimm, sum allir høvdu áhuga fyri tónleiki, og fyrstu ferð, vit spældu fyri fólki, var til brúdleypið hjá Dennu og Kjartan Mohr. Brúdleypið stóð í Klubbanum. Allir vóru vit bodnir í brúdleyp, og tá tað var liðið út móti dansitíð um kvøldið, fóru vit upp á pallin at spæla.

### Jazzband Triumph

Gággan er ikki tað upprunaliga orkesturnavnið. Andreas Restorff sigur, at fyrstu tíðina kallaðu teir orkestrið Jazzband Triumph.

Teir, sum spældu fyrstu árini, vóru Andreas R. Jacobsen (Andreas í Vágsbotn), sum spældi klarinett og saxofon, Stig Heinesen, sum eisini spældi klarinett og saxofon, Andreas Restorff klaver, Niels Restorff trummur og Verland Johansen saxofon og contrabass.

– Men Verland dugdi annars at spæla upp á eitthvørt ljóðfar, hann fekk stungið í hondina, heldur Andreas fyri.

– Vit royndu at vera nærlagdir, meðan vit vandu. Hoyrdu vit eina góða plátu, so royndu vit at fáa okkara spæl at líkjast tí á plátuni sum mest. Eisini lurtaðu vit nógv eftir tónleiki í radio og lærdu okkum løg haðani.

Tey fyrstu ljóðførini, Jazzband Triumph fekk, vórðu bíløgd úr París.

– Gjøgnum ein príslista keyptu vit eitt trummusett og eina C-saxofon. Klaver var í Klubbanum frammanundan.

Andreas sigur, at aðru ferð teir spældu fyri fólki, var til eitt sokallað »damuball« í Føroya Banka.

– Tað vóru konufólkini, sum stílaðu fyri. Eg minnist, at Dagny Mohr var ein av fyrireikarunum. Síðani fóru vit av álvara at spæla til dans hvørt sunnukvøld í Klubbanum aftan á biosýningina.

Okkara uppgáva var eisini at flyta stólar, og tað gjørdu vit so skjótt, at sveittin lak úr hvørjum hári. Harumframt varð spælt til brúdleyp og veitslur.

### Ungir spælimenn

Tað vóru ungir spælimenn í Jazzband Triumph. Sjálvur var Andreas ikki eldri enn 16 ár, tá teir byrjaðu.

– Tá gekk eg í realskúla. Tað var tíðum, at vit spældu til klokkan fimm, seks um morgnarnar, og skúlin byrjaði klokkan átta. Men tað løgdu vit einki í.

Eitt atgongumerki til Gággudans nú og tey árini, Andreas spældi, kostar eins nógv og teir fingu fyri at spæla eitt heilt kvøld.

– Tá fingu vit einar 10-15 krónur í part, og atgongugjaldið var 1 króna fyri konufólk og 1,25 krónur fyri mannfólk.

Tá Tórshøll stóð liðug, fór Gággan úr Klubbanum og niðan hagar at spæla.

– Har varð spælt til almennan dans í nøkur ár, men undir krígnum fóru vit at spæla í Sjónleikarhúsinum, har Gággan spælir enn.

– Tá varð spælt einar fýra, fimm ferðir um vikuna fyri ymsum herdeildum hjá eingilskmonnum, og altíð vóru tað tær somu genturnar, sum vóru við. Men sunnukvøld varð altíð spælt til almennan dans.

### Sum sild í tunnu

Andreas minnist, hvussu tað var at spæla undir krígnum.

– Tá varð blendað fyri vindeyguni við tjúkkum plátum. Eingilskmenn og marinarar royktu stórar Virginia-sigarir, og roykurin var øgiligur. Eingin ventilatión var heldur, so mangan var tað ikki inniverandi. Fólk stóð sum sild í tunnu, men tey stuttleikaðu sær óført. Tað skuldi eitt sterkt bróst til at spæla so ofta um vikuna. Eg minnist, at tá vit spældu eitt ávíst lag, komu eingilskmenn og marinarar við einar wiskeyfløsku upp á pallin til okkara.

Andreas sigur, at tað var eitt sjáldsama gott vinarlag millum teirra, sum spældu í Gágguni. Har kundi av sonnum orðafellið »en for alle og alle for en« brúkast.

Gággan plagdi eisini at fara út um landið at spæla til ymsar samkomur. T. d. varð spælt í Klaksvík og í Suðuroy. Men treytin var, at eitt klaver var har á plássinum, sum spælt varð. Tað varð ferðast við Sleipner og Tjaldrinum. Tá útvarpið byrjaði í 1957 varð onkuntíð spælt har eisini.

### Trúlovilsi og giftarmál

– Nú ljóðar, at Sjónleikarhúsið skal umbyggjast og samstundis útihýsa Gágguni, og eg skilji, at tað er stór mótstøða í bløðunum ímóti hesi ætlan. Ja, Gággan má víkja fyri fínari tingum, og helst fara teir at halda uppat, tá teir ikki sleppa at spæla har longur. Tað havi eg skilt á lagnum. Men Gággan man hava verið orsøkin til mong trúlovilsini og giftarmálini gjøgnum tíðina. Í Gággudansi fanst ið hvussu er altíð eitt høvi til at trúlova seg…, endar Andreas Restorf.



# Hon vælir um okkara tjóðararv

**- Tað er mær ein stórur persónligur heiður at umvæla pappírsklipp hjá Williami Heinesen, sigur Tina Johannesen, sum í løtuni stríðist við at umvæla klippini, sum eru illa farin við tíðini. Hon dylur ikki fyri, at tað er spennandi at arbeiða við verkum hjá mæta listamanninum**

LIST

*Stefan í Skorini*

Í kjallaranum á Listasavni Føroya í viðalundini í Havn arbeiðir ein kvinna við at umvæla pappírsklipp hjá Williami Heinesen. Hesi tørva eina køna hond, tí fleiri teirra eru rættiliga illa farin gjøgnum árini.

Vit eru í óruddiliga kjallaranum í listasavninum, har Tina Johannesen úr Danmark klippir og límar fyri fólk, ið eru so heppin at hava ognað sær pappírsklipp hjá skaldinum undir Varða.

Hon kennir tað sum ein stóran heiður at sleppa at umvæla hesi pappírsklipp.

– William Heinesen er ein av teimum størstu listamonnunum í Føroyum. Tí er tað ein heiður fyri meg at umvæla hansara listaverk, sigur Tina Johannesen, sum fyrr hevur búð í Føroyum, tá hon arbeiddi á Landsskjalasavninum.

William fór undir at gera pappírsklipp á gamalsaldrinum, tá hann var farin um tey sjeyti. Hóast høga aldur sín, gjørdi hann nøkur avbera vøkur pappírsklipp. Tina sigur seg undrast á, hvussu gott handalag hesin gamli maðurin hevði, og hvussu ómetaliga stillhentur, hann hevur verið, tá hann við saksinum hevur sett óteljandi smálutir inn í myndirnar.



*Tina Johannesen hevur arbeitt við at umvæla pappírsklipp hjá Williami Heinesen. Hon kennir tað sum ein heiður at umvæla verk hjá einum sonnum meistara*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Stórur áhugi

Tina Johannesen heldur, at umvælingararbeiðið gongur væl eftir umstøðunum. Hon hevur heldur tronglig arbeiðshøli, men hetta nervar ikki stórvegis.

Hon hevur fingið eini 40 pappírsklipp tilsamans, og tað eru 18 eigarar, ið hava latið Tinu síni klipp hjá Williami. Øll klippini eru ogn hjá privatfólki.

Tina sigur, at áhugin hevur verið stórur, og tað eru nøkur klipp, sum hon helst ikki fær tíð at umvæla, tí tey eru so nógv í tali. Tíðin er avmarkað, og hon hevur bara fingið tveir mánaðir at gera arbeiðið.

Umframt at umvæla klippini, so gevur hon eisini eigarunum góð ráð um, hvussu tey kunnu varðveita klippini við at goyma tey á rættan hátt.

– Tað er sera umráðandi, at klippini ikki hanga í sterkum sólarljósi hvønn dag, ella frammanfyri eini sterkari peru. Hetta ger, at liturin fer rættiliga skjótt. Eisini er tað av stórum týdningi, at klippini hanga í rúmum, har hitin er støðugur, og har luftin ikki er ov slavin, sigur Tina.

Hon sigur, at tað eru so ómetaliga nógv viðurskifti, ið hugsast skulu um, tá talan er um at varðveita slík klipp. William Heinesen nýtti sjáldan tað besta tilfarið, ið var at fáa, men hann tók mangan tað, sum lá við hondina. Hann hevur allarhelst nýtt vanligar límstiftir, tú keypir í bókhandlinum.

– William hevur nýtt heilt vanligt gávupappír, jólapappír og enntá matpappír, sum verður nýtt til matpakkar. Myndirnar eru avbera vakrar, men tær halda ikki serliga leingi, sigur Tina.

Tá tilfarið ikki er fyrsta floks, versna listaverkini, sum árini líða.



*Tað er við stórum nærlagni, at Tina hevur gjørt sítt arbeiði. Hon roynir í øllum førum at vera trúgv móti tí upprunaliga verkinum hjá skaldinum undir Varða*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Serkøn innan pappír

Nú eru hesi klippini vorðin millum 20 og 30 ára gomul, og teimum tørvar umvæling frá einum serfrøðingi.

Tina Johannesen er útbúgvin pappírskonservator á danska kunstakademinum, har hon valdi pappír sum sergrein. Hon hevur millum annað arbeitt við teimum 800 ára gomlu íslendsku skriftunum.

Í dag arbeiðir hon á Danmarks natur- og lægevidenskabelige bibliotek í Keypmannahavn. Hon hevur ikki roynt at umvæla pappírsklipp á henda hátt fyrr, men hon sigur, at hetta ikki er fremmant fyri hana.

Hon hevur eisini tvey børn við sær í Føroyum, og tey ganga í Sankta Frans skúla, meðan mamman arbeiðir við klippum í listasavninum.

### Bárður skipað fyri

Tað er Bárður Jákupsson, ið hevur tikið stig til hesa umvælingina fyri Listasavn Føroya. Og Tina heldur, at hann hevur rós uppiborið fyri hetta stigið.

– Tað er sera umráðandi, at umvælingin fer fram í Føroyum. Um klippini skuldu verið send av landinum, høvdu ikki so nógv fólk ikki latið tey til umvælingar. Her kunnu tey lata tey inn og koma aftur eftir teimum. Á henda hátt kenna tey seg óivað tryggari við at lata mær hesi virðismiklu listaverkini, ið tey eru góð við, sigur Tina.

– Eg samskifti allatíðina við eigararnar um, hvussu umvælingin skal gerast. Um tað er okkurt ivamál, so ringi eg og lati teir taka avgerð um, hvussu arbeiðið skal gerast, sigur Tina, sum leggur stóran dent á at vera trúgv móti teimum upprunaligu verkunum hjá Williami.

Tina hevur verið í Føroyum síðan 1. september, og hennara starvstíð er nærum at enda komin. Hon hevur verið glað fyri henda møguleikan og hevur framt sína uppgávu við stórum nærlagni.

– Hetta hevur verið ein dreymur, sum brádliga gerst veruleiki. Eg kann ikki forða fyri, at listaverkini farast við tíðini, men eg kann forða niðurbrótingini í eina tíð, so tey halda eitt sindur longri, sigur Tina at enda.